# Nøvn

## Føðingar

17. juni fingu Tóra Winther Reinert og Domenico Stefania eina dóttur á sjúkrahúsinum í Tønsberg í Noregi. Dótturin hevur fingið navnð Freya Loredana Winther Stefania. Hon var 48 cm long og vigaði 3545 gram.

21. juni fingu Tina Niclassen og Bárður Thomsen úr Tórhavn ein son á Hvidovre Hospital. Hann var 46,5 cm langur og vigaði 2050 gr.

21. juni fingu Alice Hofgaard Sørensen av Tvøroyri og Ingi Hansen úr Vági, búsitandi í Svendborg, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3110 gr.

24. juni fekk Ísak ein lítlabeiggja, sum eitur Kristoffer. Foreldrini eru Kristine og Thomas Andersen, Århus.

25. juni fingu Alice og Jónhard Frederiksberg, Skála, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3250 gr.

27. juni fingu Tóra Jacobsen og Jákup Egholm, Streymnesi, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

29. juni fingu Elsa Maria og Jógvan í Beiti, Klaksvík, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3300 gr.

29. juni fingu Gudrun og Steinbjørn Zachariassen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3500 gr.



## Prógv

2. juli varð Benthe Sikivat Andersen, Tvøroyri, skipsførari frá Maersk í Svendborg.

## Prógv

Hósdagin 24. mai 2010 fekk Jóhanna Rasmussen Kollafirði prógv sum kandidat í jarðalisfrøði á Universitetinum í Keypmannahavn.

## Prógv

Ívar Poulsen, Tórshavn, hevur tann 1. juli fingið handað prógv sum skipsførari frá SIMSC í Svendborg.

# Johannes Jacobsen 75



Hósdagin 1. juli fylti Johannes M. Jacobsen í Havn, vanliga nevndur Hannis, 75 ár.

Hannis arbeiddi í mong ár hjá Frants Restorff, har hann stóð fyri framleiðsluni á bommvirkinum. Seinni gjørdist hann dagligur leiðari á Bókamiðsøluni, til hann fór frá fyri aldur.

Hann var ein av stovnarunum av hondbóltsfelagnum Kyndli og hevur verið virkin í felagnum bæði sum leikari og í nevndini.

-red

# Arnfinn 50 ára starvsdag



*Hósdagin var almenn móttøka í Eik Banka í sambandi við 50 ára starvsdagin hjá Arnfinni Poulsen*

Mynd: Álvur Haraldsen

Í sambandi við at Arnfinn Poulsen hevur starvast í Eik Banka í 50 ár, var almenn móttøka hósdagin 1. juli í høvuðssætinum hjá bankanum yviri við Strond.

Arnfinn byrjaði í Føroya Sparikassa 1. juli í 1960. Hann hevur arbeitt har øll árini síðan og gevst eftir ætlan fyrst í august í ár. Arnfinn var 17 ára gamal, tá hann byrjaði sum lærlingur í Sparikassanum í Sverrisgøtu, har Albin Bærentsen var stjóri. Hesi 50 árini hevur hann verið við í allari tilgongdini frá átta starvsfólkum til yvir hundrað og frá vanligum skrivimaskinum til framkomnar teldur.

Í sambandi við 50 ára starvsdagin fekk Arnfinn Dronningens Fortjenstmedalje fyri trúgva tænastu.

# Hendrik Rubeksen 70



Hósdagin 1. juli fylti Hendrik Rubeksen, fyrrverandi løgreglumaður í Havn, 70 ár.

Hendrik byrjaði sum politistanæmingur í Keypmannahavn 1. januar 1963. Eftir lokna útbúgving varð hann settur sum politistur í Havn. Tann 1.august 1977 varð hann settur sum vaktarleiðari í Havn, og frá 1. mai 1984 var hann dagligur leiðari á avgreiðsludeildini.

Hendrik hevur verið virkin í felagslívi, bæði í ítróttini og losjuni sum skrivari í Stórlosjuni og formaður fyri Tempulriddaraordanin. Hann var landsformaður fyri IOGT í 10 ár.

-red

